VIÐMERKINGAR

# Fíggjarlóg og fíggjarpolitikkur

Reidar Nónfjall



**Inngangur**
Umrøðan av fíggjarlógini hevur í nógv ár mest handla um at veita almennar sosialar tænastur og vinnuligan studning. Fíggjarlógin verður í lítlan mun brúkt til at ávirka og skapa vinnupolitiskar karmar og annars stabilisera samfelagsbúskapin. Í føroyska búskapinum er fíggjar-lógin einasta veruliga búskaparpolitiska amboðið, sum kann brúkast til at ávirka búskaparligu gongdina í samfelagnum á fleiri týðandi økjum - hetta samskipað við orðing av vinnupolitikki, útbúgvingarpolitikki o.a.

Tað verður í hesari greinini lýst, hvussu ein fíggjarlóg er sett saman og hvat fíggjarpolitikkur veruliga handlar um. Harafturat verður lýst, hvat fíggjarpolitikkur er í Føroyum.

## Fíggjarlógin og játtanarskipanin
Í 1996 innførdi landsstýrið og løgtingið eina nýggja játtanarskipan hjá landinum og formaliserði landsins roknskaparverk við rammulóg og kunngerð. - eitt kollveltandi framstig innan fíggjarstýringina hjá landinum.

Harafturat varð innkeypt ein umfatandi administrativ búskaparskipan at skráseta og rapportera roknskaparupplýsingar um landsbúskapin. Tað virkar sum um, at hetta stýringaramboð ella búskapar-skipan ikki verður brúkt til at taka politiskar avgerðir, sum gera mun og skapa fram-burð. Heldur verða landsroknskapir brúktir til søguligar uppgerðir og konfrontatiónir um meirnýtslu - ístaðin fyri at fyribyrgja búskaparliga vandakós. Framleiðslan av búskaparligum informatiónum minnir um eitt informatións-kaos, sum fá eru før fyri at gjøgnumskoða og brúka í politiska arbeiðinum. Vert er at leggja til merkis, at tað almenna hevur fokus uppá eftirlit og frávik og ikki mál og úrslit. Hetta fokus hevur ma.a. við sær, at øll fíggjarstýring hjá landinum handlar um regulstýring og alt ov lítið uppá rationellar handlingar, tiltøk og støðutakanir.

Endamálið við fíggjarlógini sum fíggjarætlan er m.a. at seta sær politisk mál, motivera tað almenna til menning, útdelegerað ábyrgd o.a.

## Bólking av almennum útreiðslum, td.:
**Almennar veitingar**
- ALS-dagpengar
- Fólkapensión
- Eftirløn
- Útbúgvingarstuðul.

**Tænastuveitingar**
- Heilsurøkt
- Eldrarrøkt
- Útbúgving
- Dagstovnar

**Aðrar útreiðslur**
- Almen umsiting
- Samferðsla
- (Politi, rættarskipan o.a.: er ikki á fíggjarlógini).
- Vinnuligur studningur/stuðul
- Vinnuframskipanir og grunnar
- Almennar vinnufyritøkur (nakrar umlagdar til almen partafeløg og fáa ikki longur almenna játtan).

**Útreiðslurnar kunnu aftur býtast í hesi sløg av útreiðslum, ma.a.:**
- Rakstrarútreiðslur
- Løguútreiðslur
- Lógarbundnar útreiðslur (serløggáva).

**Bólking av almennum inntøkum, td.:**
**Beinleiðis skattir**
- Persónskattir
- Partafelagsskattir
- Fíggjarognaravgjald (ongin ognarskattur).

**Óbeinleiðis skattir**
- Meirvirðisgjald
- Punktgjøld
- Orkugjøld
- Skrásetingargjøld

**Aðrar inntøkur**
- Brúkaragjøld
- Bøtir.

Viðmerkjast kann, at ávirkanin frá fíggjarpolitiskum tiltøkum, td. lægri skattaprosentum, er óbein-leiðis og tekur longri tíð enn td. ávirkanin frá pengapol-itiskum tiltøkum, td. ein rentulækking og ávirkanin á lántøku og pengaflytingar.

Vísandi til omanfyri standandi útreiðslubólkar og útreiðslusløg er tað ógvuliga umráðandi, hvussu raðfest verður og hvørjar útreiðslur, eitt nú kunnu verða við til at framtíðartryggja eksistensgrundarlagi hjá samfelagum og livi-standardin. Fleiri stór málsøkir verða fíggjað umvegis donsku heildarveitingina og hvussu megna vit møguligar yvirtøkur.

Tað sum m.a. er relevant er at arbeiða við einum útreiðslu- og inntøkubygnaði, sum best undir-byggir tey mál, sum sett verða.

Landsstýrið eigur í hesum sambandi við at seta meira orku av til stabila framleiðslu og leveransu av hagtalsupplýsingum um føroyska samfelagið (tað, sum ikki verður skrásett kann ikki stýrast).

## Fíggjarpolitikkur
Uppgávurnar hjá tí almenna - land og kommunur
- Veita borgarunum almennar tænastur
- Regulera og stýra samfelagsbúskapinum (konjunkturjavnan, vinnuskapandi íløgur, selek-tiv vinnutiltøk, stuðul til innovativar vinnuverkætlanir o.a.)
- Útlíkna sosialar ójavnar í samfelagnum.

Fíggjarpolitikkur verður framdur við at ávirka eftirspurningin við at broyta inntøkur og útreiðslur hjá landinum, umvegis fíggjarlógina. Á henda hátt ávirkast td. gjaldsjavnin, framleiðsla, arbeiðsmarknaður og inflatión.

Tað hava gjøgnum tíðirnar, millum búskaparfrøðingar, verið nógvar ymsar fatanir av, hvussu fíggarpolitikkurin eigur at brúkast í politisku stýringini av samfealgsbúskapinum. Skilt verður í millum aktivan og passivan fíggjarpolitikk og stabiliserandi fíggjarpolitikk. Skilt verður eisini millum stutttíðar og langtíðar árin. Harafturat verður skilt millum ekspansivan fíggjarpolitikk (td, hægri almennar útreiðslur og lægri skattir) ella kontrativan fíggjarpolitikk (lægri almennar út-reiðslur og hægri skattir).

Fíggjarpolitikkurin fevnir í øllum framkomnum londum eisini um at samskipa kommunala búskapin við landsbúskapin - tað er næstan bara í Føroyum, at vit kunnu finna uppá at kjakast um hetta skal verða soleiðis. Eitt úrslit av vantandi samskipan er, at føroysku kommunurnar liva sítt egna búskaparliga lív. Fyri bara umleið 12 árum síðani varð avleiðingin av vantandi búskapar-ligari samskipan, at allar tær føroysku kommunurnar vóru settar undir umsiting av landsstýrinum - vegna lutfalsliga stórar og skilaleysar lántøkur.

So tá Karsten Hansen, fyrrv, lands-stýrismaður og Bárður Nielsen, fíggjarmálaráðharri vilja samskipa kommunala búskapin við landsbúskapin er hetta rætt og neyðugt, og eigur at styrkjast munandi - serliga tá hugsað verður um, at flestu føroysku kommunurnar hava sera avmarkaðan førleika og orku til umsiting. Til samanberingar kann upplýsast, at í Norra, Svøríki og Danmark er ógvuliga neyvt og greitt eftirlit við kommunum og amtum.

## Fíggjarpolitikkur í Føroyum
**Meginreglur um markanaðar- ella planbúskap**
Í føroyskum fíggjarpolitikki er ikki tikin politisk støða til meginreglurnar, um fíggjar-politikkurin skal grundast á marknaðarbúskap ("statsmaktin" stýrir minst møguligt) ella planbúskap ("statsmaktin" stýrir mest møguligt) ella ein blandingsbúskap og hví? Ein politisk støðutakan til hesar meginreglur merkir m.a., at støða má takast til, um landið skal eiga og reka almennar vinnuligar fyritøkur. Støða má eisini takast til um studningur og stuðul skal veitast til vinnuna og í hvønn mun og til hvørji endamál.

Viðmerkjast kann, at ein stórur almennur leiklutur (planbúskapur) hevur við sær eitt stórt skatta- og avgjaldstrýst og er m.a. við til at taka initiativi frá íverksetarum, meðan ein marknaðar-búskapur hevur tað øvugtu ávirkanina.

Ein støðutakan til marknaðar- ella planbúskap merkir, at greiður skilnaður kann gerast millum tað, sum er privat og tað, sum er alment - í løtuni flýtur hetta mark.

Uttan mun til marknaðarbúskap, planbúskap ella blandingsbúskap kunnu vit avgerða, at heilsu-røkt, almannahjálp, útbúgving og aðrar sosialar veitingar eru á einum nøktandi og tryggum støði.

## Útreiðslu- og inntøkubygnaður á fíggjarlógini
Landið hevur nógvar upplýsingar um útreiðslur og inntøkur hjá landinum. Hóast hetta er ongin umrøða ella avgerð tikin um hóskandi býtið av útreiðslum til rakstur, íløgur, lønir, lógarbundar útreiðslur o.a. Tað er heldur ongin umrøða av, hvussu stórt fíggjarlógarhall landsstýrið kann loyva sær í mun til BTÚ og ongar ásetingar um, hvussu fíggjarlógarhall eftir ætlan og tiltøkum eiga at rætta seg upp aftur.

Ongin almenn tilgongilig langtíðarætlan er fyri rakstur og íløgur, har boð kann gevast uppá, hvussu gongdin verður í útreiðslunum til pensiónir, útreiðslur til studning og stuðul, útreiðslur til infraútbygginar og hvørjar, um parta--felagsskatturin kann lækkast o.a. Ongar útreiðslukrevjandi lóggávur verða endurskoðaðar - hetta er kortini politiskt fráboðað fleiri ferðir.

## Slag av fíggjarpolitikki
Tað er enn ikki tikin støða til hvørt føroyskur fíggjarpolitikkur skal verða aktivur, passivur, stabili-serandi ella brúkast á annan hátt enn seinastu 30 árini.

## Samskipan av almennum málsøkjum
Fíggjarlógin er sett saman av nógvum ymiskum málsøkjum. Tað kann ikki vera rætt, at einasta týdningarmikla øki at samskipa og rationalisera er ein vekslaraskipan hjá aðalastørunum - tvs. hava felags vekslara fyri øll aðalstýrini.

Fíggjarpolitikkur og innihaldið í fíggjarlógini eigur tí neyvt, at samskipast við fiskivinnu-, útbúgv-ingar-, vinnu-, skatta-, sosialpolitik og annan politik. Føroyar eru eitt land (mikroland) við av-mark-aðari mongd av førleika og tilfeingi og tí er neyðugt við innanhýsis samstarvi í politisku og fyri-sitingarligu skipanini.

Tað er ov lítil og tilvildarlig samskipan av landsbúskapinum og kommunala búskapinum og er hetta ein vandi fyri rættartrygdina hjá borgarunum.

## Hvat er føroyskur fíggjarpolitikkur
Tað kann sigast við fáum orðum, hvat føroyskur fíggarpolitikkur er. Føroyskur fígggjarpolitikkur verður viðgjørdur alment einaferð um árið í tíðarskeiðnum okt.-nov. í sambandi við árligu fíggjarlógina. Harafturat er føroyskur fíggjarpolitikkur ein viðgerð av einstøkum sakum og málum - eykajáttan til musikkskúlan, nýtsla av innistandandi í landsbankanum, fakfelagskonfrontatiónir, studningur til rækjuflotan, liðugtgerð av landssjúkrahúsinum, show-eyðkend viðgerð av eyka-játtanum.

Tað verður so at siga ongantíð nomið við meginreglur, heildina og fíggjar-politiskar málsetningar. Tað verður heldur ikki arbeitt uppá forkant við teimum møguleikum, sum eru og sum Føroyar kundu fingi stóra nyttu og framgongd av. Signalini hetta sendir til vinnuna og borgaran er, at politiska skipanin er óstøðug og arbeiðir uttan mið og mál.

## Samanumtikið
Samanumtikið kann sigast, at landið ikki hevur ein greiðan fíggjarpolitikk. Hinvegin hevur landið fortreytir, við innan- og uttanhýsis upplýsingum og royndum, at áseta ein fíggjarpolitikk. Føroyska politiska skipanin kann fáa sær vitan og kunnleika um fíggjarpolitikk í teimum londum, har tað gongs væl búskaparliga og lond, sum eru ein fyrimynd fyri onnur lond - danskur fíggjarpolitikkur verður td. brúktur, sum fyrimynd í fleiri av EU-londunum.

Tað verður neyðugt í sambandi við framtíðar fíggjarpolitik at arbeiða heilt øðrvísi enn gjørt verður í løtuni. Ein treyt fyri at verkseta og náa størri fíggjarpolitiskum málum, er at finna breiðar politiskar semjur, hava mentalt dirvi at taka strategiskar politiskar avgerðir og taka øll lokalmál, smámál og persónsmál av landspolitisku høvuðsskránni.

Ein ógreiður fíggjarpolitikkur og tilvildarlig stýring av samfelagsbúskapinum og teimum umleið 4 milliardunum, sum fíggjarlógin javnvigar við og vantandi politiskar støðutakanir, fáa avleiðingar. Antin verða fíggjarpolitisku uppgávurnar loystir leypandi ella bíða vit og trupulleikarnir gerast ov stórir og óloysiligir, av tí, at uppgávurnar seta krøv, sum vit ikki megna at lúka komandi árini.

---

*Framhald av síðu 10*

ligari, tí umframt at teir sum oftast ikki sleppa at búgva saman við sínum egnu børnum, eru tær almennu skipanirnar ofta vendar ímóti teimum. Og tað er m.a. ferðastuðulin hjá Stuðulsstovninum eitt dømi um. Eg fari tí at heita á landstýrismannin í mentamálum um at bera so í bandi, at ferðastuðulin til børn eisini skal galda fyri fólk - mannfólk og konufólk - sum ikki búgva saman við sínum børnum.

Á hesum økinum er nevniliga ikki javnstøða.